## Ð aftur á gøtuni




**Eftir drúgvan steðg er Jógvan á Høvdanum nú aftur farin undir útgávuna av mannfólka- og ungdómsblaðnum, Ð**

BLAÐÚTGÁVA

Fyrsta útgávan í nýggju røðini skal verða á gøtuni leygardagin, og er talan um 40 síður, har evni av ymsum slag verða viðgjørd. Blaðið provokeraði í síni stuttu livitíð rættiliga nógv fólk. Serstakliga tí nógvar frekar myndir av konufólki vóru í blaðnum.

Í innihaldinum hesa ferð eru tó eisini aðrir lutir. Eitt eru tema um bilar og poker, umframt at samrøður við persónar eisini eru í blaðnum.

Tað er Jógvan á Høvdanum, yngri, sum stendur fyri útgávuni. Finnur Justinussen er myndamaður á blaðnum.

## Frálíkt ummæli av Pleaser

Óvanliga høgt tónlistarligt støði, væl upplagdir og "en sprudlende konsert" tey jaligu viðmælini av Pleaser, sum er danski bólkurin hjá føroysku brøðrunum Jens John og Argrím Jacobsen, eru nógv í ummælinum hjá Midtsjællands Folkeblad av konsertini hjá Pleaser í Starfighters kappingini, sum var hildin á Skanderborg Festivalinum herfyri. Hetta er sama kapping, sum Gestir var við í fyri tveimum árum síðan.

Bólkurin átti sambært blaðnum við sínum frálíka blandi av rokki, poppi og tekno at verið millum fyrstu tríggjar bólkarnar í kappingini. Gaffa.dk gav somu framførslu eina av seks møguligum stjørnum, og kallaði teir m.a. "En temmelig tynd omgang stadionrock". Hetta vísir bara hvussu ymiskir ummælarar kunnu vera á máli.

Sambært blaðnum hevur eitt plátufelag aftan á konsertina víst stóran áhuga í Pleaser, Hvat plátufelag talan er um, veit blaðið ikki at siga.

**nud**

## Føroyskur tungmálmur á alnetinum

Sic hava gjørt upptøkur av tveimum rokkandi, hørðum og tungum málmsløgum, og hava lagt tey á heimasíðuna hjá bólkinum, www.entersic.com, løgini "Rough" og "Fading" vísa hvussu nógv Føroya harðasti bólkur rokkar. Í sambandi við alnetútgávuna av løgunum spælir Sic konsert saman við the Dreams í TB-Húsinum 3. september.

Sic hava tikið løgini upp í venjingarhølunum hjá The Dreams, og talan er um eina demo, sum hvørki er ljóðblanda ella upptikin undir fullkomnum umstøðum, men ljóði á serliga lagnum "Rough" er brúkilig, og fyri rokkelskarar eru løgini frálíkar upplivingar, ið kunnu viðmælast.

**nud**

## 200 á rundferð við Rundfunk

200 skulu í sambandi við sína konsert í Vega í sendingina Rundfunk á TV2, ið er ein tann best dámda tónleikasendingin í donskum sjónvarpi. TV2 tekur upp meðan teir spæla um kvøldið í Vega, og fer somuleiðis eina rundferð við teimum.

200, gestir og Makrel hava fingið hópin av reklamu í sambandi við Atlantic Music Event í danska høvuðstaðnum, og sermerktu plakatirnar við einum seyðarhøvdið, hava fingið danir at leggja merkið til tiltakið.

**nud**

# Online Business Game fyri íverksetarar

KUNNINGARTØKNI

*www.startup2005.com*




Eitt nýtt føroyskt »Internet business game« kallað STARTUP, verður nú ment av føroyskari fyritøku til alheimsmarknaðin. STARTUP gevur næmingum á miðnámsskúlum og hægri lærustovnum høvið at royna seg sum íverksetarar. Føroyska KT-fyritøkuni Simprentis hevur ment Internet simuleringina, og er hetta liður í einari norðurlendskari verkætlan kallað PICYBU.

Menningarstovan hevur tikið stig til STARTUP spælið. Hetta er partur av arbeiðinum at stimbra íverksetara mentanina, og geva lesandi ungdómi innlit í avbjóðingarnar, tá ið egið virki skal setast á stovn. Serligur dentur verður lagdur á munin á avbjóðingunum, tá íverksetarin skal velja í millum heimamarknað ella altjóða marknað, umframt at dentur verður lagdur á at skapa virkissamstørv millum lond.

STARTUP er ein simulering gjørd til Internetið, har luttakararnir reka vinnuligt vinnuvirksemi sum búsitandi í útjarðarøkjum. Útjaðarøkir eru í hesum føri Northern Periphery øki, sum er norður Finnland, norður Svøriki, norður Norra, Føroyar. Skotland (Highland and Islands), Ísland og Grønland. Avbjóðingarnar fyri ein íverksetara eru at kalla tær somu í øllum útjaðaraøkjum.

Endamálið við STARTUP er at geva luttakarunum eina fatan av, hvat krevst av einum íverksetara og virkiseigara, eins og at fata tær serligu avbjóðingar sum íverksetarar í útjaðaranum kunnu vænta sær. STARTUP er ment við góðum royndum frá tí væl kenda spælinum Xplore, sum Simprentis mentið fyri nøkrum árum síðani, tá ið fyritøkan húsaðist í KT Klekingardeplinum á Menningarstovuni.

Hvør luttakari fær atgongd til simuleringina umvegis Internetið. Í simuleringini kunnu luttakararnir velja millum nógvar handilsmøguleikar úr veruliga heiminum, gera virkir saman við luttakarum úr skúlum í øðrum londum, velja sær ein marknað á antin lokala- ella globala marknaðinum og reka virkini á best møguligan hátt í kapping við aðrar luttakarar.

### Málbólkur og tíðir

STARTUP er ætlað 16-22 ára gomlum næmingum í miðnámsskúlum og hægri lærustovnum. Tað vera 2 atskild spæliborð: eitt fyri miðnámsskúlar og eitt fyri hægri lærustovnar. Mett verður at einir 200 næmingar tilsamans frá 4 ymiskum londum fara at luttaka í fyrstu kappingini, sum verður 22.-24. november í ár.

Tað einasta sum krevst av hvørjum einstøkum luttakara er at hava atgongd til eina teldu, sum er bundin í Internetið, meðan kappingin er. Tað mugu í hvussu er vera ein næmingur og ein lærari frá hvørjum útbúgvingarstovni.

Í STARTUP eru lærararnir á útbúgvingarstovnunum hjálparfólk. Teirra uppgáva er at skipa fyri kappingini á staðnum og hjálpa næmingunum at nýta simuleringina. Fyri at lærararnir kunnu vera væl fyrireikaðir til hetta, verða "online" hjálparskeið fyri lærarar 17., 18. og 19. november 2005.

Tann fyrsta kappingin verður sum nevnt 22. - 24. november 2005. Kappingin er í gongd frá kl. 08.00 til 14.00 føroyska tíð allar dagarnar. Eftirfylgjandi kappingar eru settar at vera í mars, oktober og november í 2006. Minst 2 kappingar verða árliga fram til endan av 2009. Skúlar kunnu luttaka í einari ella fleiri kappingum.

NPP (Northern Periphery Programme) verkætlan

Menningin av STARTUP er partur av stóru verkætlanini PICYBU, sum Menningarstovan eisini er partur av. Av tí at PICYBU er stuðlað av Northern Periphery Program verður einki luttøkugjald kravt frá miðnámsskúlum og hægri lærustovnum í Føroyum, norður-Noregi, norður-Svøríki og norður-Finnlandi (Northern Periphery økini í hesum londunum), sum eru partar í PICYBU verkætlanini. Onnur lond kunnu luttaka við at gjalda eitt ásett luttøkugjald.

Kappingin (www.startup2005.com) verður fyriskipað av verkætlanini PICYBU (Participation in rural Communities by Young Broadband Users) www.picybu.org, sum verður stuðlað av ES Northern Periphery Programme www.northernperiphery.net og lokalum myndugleikum í økjunum. Vinnuframagrunnurin stuðlar føroysku luttøkuni. STARTUP er sniðgivið, ment og latið av Simprentis www.simprentis.com.

Meira fæst at vita um PICYBU verkætlanina hjá Steinbjørn í Dali á Menningarstovuni, og um STARTUP frá Ólavi Ellefsen á Simprentis.

# Skeið um messur

MESSUSKÚLI

Fríggjadagin 16. september 2005 skipar Synergi fyri einum »Messuskúla«.

- Vit fáa vitjan av fyrrverandi marknaðarstjóra hjá Svenska Messan í Gøteborg, Björn Malmström, sum hevur nógvar royndir við messum, bæði í teori og praksis. Björn fer at viðgera teir ymisku hornasteinarnar, sum standast av at luttaka á einari messu og teir eru nógvir, sigur Synergi í tíðindaskrivi.

Vit vita, at tað er kostnaðarmikið at hava bás á messum. Kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi. Men við rætta bási og rætta framferðarhátti á básinum, kann tað tó geva fyritøkuni nógv og góð kundasambond. Men

- Hvat er ein »rættur« básur?
- Skulu tit fylla hann við alskyns vørum og tænastum?
- Hvat er eitt MUST og hvat er absolutt bannlýst?
- Hvat við fyrireiking áðrenn? Hvat við framferðarhátti á sjálvari messuni?
- Og hvat við uppfylging?

Um tín fyritøka javnan luttekur á messum her heima ella uttanlands, ella um tit umhugsað at fara tann vegin í tykkara sølustrategi, so er "Messuskúlin" júst nakað fyri tykkum. Á skeiðinum fáa tit íblástur til at taka endaligu avgerðina, tit fáa íblástur til hvussu tit skulu bera tykkum at og hvussu tit í størst møguligan mun tryggja, at tit fáa nakað burturúr tíðini og pengunum sett verður av til hetta?

Málbólkur: Fyritøkur sum javnan hava bás á messum, bæði herheima og uttanlands. Fyritøkur sum umhugsað at luttaka á messum, fólk á marknaðardeildum og søludeildum, sum antin fyrireika ella luttaka aktivt á messum sum sølufólk. Eisini er tað upplagt hjá starvsfólkum á lýsingastovum at luttaka. Meiri fæst at vita á www.synergi.fo